– trygt og ómakaleyst til hús

# Nýggj arkitektteknað lágorkuhús

INNI



Húsini hava hitapumpu og standa í náttúruvøkrum umhvørvi við panoramaútsýni.









## Umvørvið uttan

Tú koyrir til Velbastað og snarar til vinstru við annan vegin inn í nýggju útstykkingina á Jákupstrøð. Har standa fleiri nýggj hús, og fleiri eru á veg. Her er friðarligt og frálíkt útsýni er yvir oyggjarnar sunnanfyri og vestanfyri og yvir allan fjørðin. Húsini standa í barnavinaligum umhvørvi við blindan veg. Dagstovnur, skúlar, sparkivøllur og busssamband til Havnar er nær við. Tá ið tú kemur til húsini, sært tú, at alt er nýtt og so fekst, og at lítið og einki er gjørt uttanum, men so hevur tú eisini møguleikan at seta tín egna dám á títt nærmasta umhvørvi uttan um húsini og gera garð / urtagarð og annað. Pláss er sett av til at byggja bilhús / bilskúr, har takið er útigólv / terassa út frá stovuni, og hurð er í stóru stovuni í erva til tað.

## Inni – stílur og snið

Húsini eru teknað av einum av okkara kendu allar bestu arkitektum, og tey fella væl inn í landslagið, samstundis sum stílur og snið, rakstur og viðlíkahald, hugni og livilighei t ganga upp í eina hægri eind. Húsini eru skipað og innrættað, so øll kunnu vera saman og hvør sær. Frálík baðirúm eru í báðum hæddunum og hjúnarrúmið er í erva, meðan hini kømurini eru í neðra. Sjálvsagt kann hjúnarrúmið brúkast til vanligt kamar ella arbeiðsrúm, og hurð er út til altan / útigólv, har tú kanst fáa tær ljós og luft og njóta frálíka útsýnið yvir Skopunarfjørð. Alt er ljóst og vakurt og gjørt úr besta tilfari við besta handverki. Stóru vindeyguni geva tær ikki bara panoramaútsýni úr allari ovaru hædd, men ljós og luft. Tú kennir teg ikki innilæstan, men so at siga eitt við umhvørvið, samstundis sum tú tó kennir teg væl og virðiliga inni hjá tær sjálvum. Tað er ein sonn frægd at sita við stóra borðið í ljósa alrúminum við høga loftinum upp í tróðrið sum skánar niður í hugnaliga karnappin og njóta frálíka útsýnið og umhvørvið. Her er einki at hugsa um. Alt er gjørt liðugt innan, so tú kanst flyta beint inn í frálíku húsini.

## Innrætting

Í niðaru hædd er inngongd, hall, baðirúm, 1 stórt kamar, 2 minni kømur og bryggers / vaskirúm / fýrrúm. Í ovaru hædd er trappugongd / alrúm / køkur / borðsstova / stova við hurð út til eitt komandi útigólv vestureftir, baðirúm og hjúnarrúm / arbeiðsrúm við útgongd til altan eystureftir.

## Fakta

**Addressa:** ...........**Gerðsibreyt 9, Velbastaður**
**Byggiár:** .............**2009**
**Hæddir:** ..............**2**
**Gólvvídd:** ............**155 m²**
**Grundøki:** ...........**645 m²**
**Prísuppskot:** .....**kr. 2.100.000**









PF INNI
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**